*Erling Olsen, formaður í fólkatinginum:*

# – Tit vinna á kreppuni

*Um vit liva nóg leingi, so hava tey flestu verið fyri framgongd og afturgongd í samfelagnum. Tað hevur tó altíð borið til at venda gongdini rætta vegin aftur, og tað fara føroyingar eisini at megna, sigur Erling Olsen*

Erling Olsen er gamal í donskum politikki. Hann var fyrstu ferð valdur á fólkating í 1964 í sosialdemokratiska flokkinum.

Síðani hevur hann verið fólkatingmaður í fleiri umførum, og eisini bústaðarmálaráðharri í fleiri stjórnum hjá Anker Jørgensen.

Erling Olsen er professari í nationaløkonomi á Universitetinum í Keypmannahavn, eins og hann eitt skifti var rektari á Roskilde Universitet.

Seinast var hann løgmálaráðharri í fyrstu stjórnini hjá Nyrup Rasmussen.

Eg eri 68 ára gamal, so eg syngi seinasta ørindið í politiska yrkinum, men eg syngi fegin ... sigur Erling Olsen skemtandi. Hann er í Føroyum saman við formansskapinum í fólkatinginum, sum hevur vitjað tingið í hesum døgum.

### Ein spurningur um hvør skal gjalda

Erling Olsen hevur verið í Føroyum áður, men tá var so nógvur mjørki, at lítið og einki sást. Á hesi ferðini er "klárnað" – og tingformaðurin er væl nøgdur við tað, tó at hann ikki vil viðganga, at hann nýtir hetta sum myndbering í støðuni millum londini bæði. Hann vónar tað kortini, og fer beinanvegin at tosa um bankamálið.

Bankamálið hevur hann ongan áhuga fyri, tí tað snýr seg veruliga bert um, hvør skal gjalda eina ávísa upphædd fyri ein bankahandil.

Nú verður málið kannað, og so er bert at bíða eftir úrslitinum, sigur Erling Olsen. Hann umboðar, sum formaður í fólkatinginum, ikki donsku stjórnina, men skal tvørturímóti virka ópolitiskt, av tí at hann skal tilgóðasíggja allar politiskar flokkar í fólkatinginum.

– Tað er einki hugaligt at líta aftur um bak. Heldur eiga vit at hugsa um framtíðina, og tá haldi eg tað vera áhugaverdari at fáa gongd á føroyska samfelagið, bæði um búskapin soleiðis, at arbeiðsloysið minkar og fólk kunnu flyta heimaftur, sigur Erling Olsen.

### Olju- og fiskivinnan

– Her eru serliga tvey mál, sum eru umráðandi hjá donum at umhugsa, í royndini at hjálpa føroyingum burtur úr kreppuni.

– Eitt er oljuvinnan. Her kann danska stjórnin stuðla føroyingum í sáttmálasamráðingunum við bretar. Neyðugt verður eisini at stuðla oljuvinnuna soleiðis at prísir og útreiðslur í menningartíðini verða rímiligir í mun til hvørt annað. Her kunnu danir láta tekniska serkøna hjálp. Eg eri sann-førdur um, at vit fara at gera alt vit eru mentir at hjálpa og stuðla tykkum, sigur Erling Olsen.

– Hitt økið er fiskivinnan. Hóast hetta er serføroyskt mál, og vit tí ikki løgfrøðiliga hava skyldur mótvegis Føroyum, so hava vit kortini moralska skyldu, um vit skulu fáa ríkisfelagsskapin at virka aftur, sigur Erling Olsen.

Hann heldur annars ikki, at bankamálið í sjálvum sær skal hava alla skyldina fyri kreppuna í Føroyum.

– Vit, sum eru nóg gomul, hava verið eygleiðarar til nógvar kreppur gjøgnum árini, vita, at tað ber til at vinna á slíkum trupulleikum. Tað fara føroyingar eisini at gera hesaferð, sigur Erling Olsen.

Erling Olsen er ikki sørt bilsin, eftir at hava vitjað í tinginum og tosa við tingfólk. Hann heldur tað vera sera áhugavert, at tingið í hesum trupla tíðarskeiðið við samfelagskreppu og nógvum trupulleikum annars, eisini hevur havt orku at gera nýggja stýrisskipanarlóg.



*Erling Olsen, formaður í fólkatinginum: – Eg eri 68ára gamal, so eg syngi seinasta ørindið í politiska yrkinum, men eg syngi fegin ...*

### Frá støðuni sum amtsráð til parlament

– Henda broytingin hevur við sær, at nýggja lógin lyftir tingið frá at vera eitt amtsráð, til eitt veruligt parlament á altjóða støði, sigur Erling Olsen.

Á tveimum fundum í tinghúsinum hava umboðini fyri tingformansskapin í Danmark og Føroyum tosað um teknisk mál. Erling Olsen nevnir tað tingteknik. Tað er m.a. at greiða hvør øðrum frá, hvussu mál verða avgreidd í einum parlamenti.

*Formansskapirnir báðir hava samtykt at samstarva. Hvønn týdning hevur tað fyri londini bæði?*

– Tað hevur ið hvussu er tann fyrimun, at vit hittast og læra hvønn annan at kenna. Oftani tosa vit í telefon um ymisk praktisk mál. So er tað ein fyrimunur at vit kenna tann, sum vit tosa við. Harnæst kunnu vit skapa samband millum politikarar í teimum ymisu flokkunum í fólkatinginum og á tingi.

– Tað, sum fundirnir mest hava snúð seg um er, at vit hava vit greitt hvør øðrum frá, hvussu vit avgreiða tingmál, og tað er meira teknisk mál. Vit hava tí ikki havt stundir at tosa um politikk, sigur Erling Olsen.

Erling Oslen sigur annars, at hann sum formaður í fólkatinginum, ikki skal leggja meg út í flokspolitisk mál, men at hann hinvegin arbeiðir innanhýsis í sosialdemokratiska flokkinum.

Tað vil hann eisini fegin greiða frá, nú hann tosar við eitt umboð fyri blaðjavnaðarfloksins.

### Brúk fyri hugsjónini

Hann heldur, at vit meir enn áður hava brúk fyri sosialdemokratisku hugsjónini, sum mótvegis sosialismuni eystanfyri, ið nú er fallin, ikki er eitt materalistiskt passiv, sum henda var.

– Vit hava meir enn nakrantíð brúk fyri humanistiskari sosialismu, sum javnaðarflokkarnir í øllum londum byggja á, sigur Erling Olsen. Hann hevur verið við til at seta orð á nútíðina í



*Erling Olsen, fólkatingformaður, og Marita Petersen, tingformaður, hava í hesum døgum ... saman við umboðunum fyri tingformansskapin í Danmark og Føroyum tosað um tingteknik. Erling Olsen sigur, at stundir hava ikki verið at tosa um politisk mál. Tó hava tingformenninir tosað um ymiskt, sum hevur við javnaðarflokkarnar í báðum londunum at gera*

